# Bjargar Bali heiminum?




*Formaðurin í IPCC Rajendra Pachauri hevur ein lyklaleiklut á Bali*



*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*
*be@implementer.dk*



*Al Gore er vorðin ein ímynd í umhvørvisstríðnum*



*Bill Clinton er eisini farin inn í umhvørvisstríðið*



*Ban Ki-moon og ein sum merkir veðurlagsbroytingar heita á heimin um hjálp*

Veðurlagsbroytingar hava staðið ovarlaga á breddanum seinastu árini. Í ár hevur uppmerksemi viðvíkjandi veðurlagsbroytingum verið sera stórt. Í Føroyum hevur tað mest verið kjakið viðvíkjandi Kyoto sáttmálanum, men eisini hava verið hissini orðaskifti um burðardygga orku.

Tað liggja tungar avgerðir og harðar samráðingar fyri framman á veðurlagstoppfundinum á Bali, sum byrjaði í gjár og heldur á til 14. desember. Serliga uppgávan á skránni er at seta veruligan skjøtil á karmarnar fyri avtaluna, sum skal avloysa Kyoto avtaluna. Indonesar ynskja sjálvsagt at fáa semjuna til høldar á hesum fundinum, soleiðis at hon kann eita Bali avtalan. Mest sannlíkt er tó at partarnir semjast um karmarnar á avtaluni og síðani verður endaliga avtalan gjørd á veðurlagstoppfundinum í Keypmannahavn í 2009. Tað er tað, sum umhvørvisparturin hjá ST, UNE, hevur sett á skrá til fundin. Tað verður mett avgerandi neyðugt, at avtalan er klár í 2009 soleiðis at londini hava tíð til at seta hana í verk áðrenn Kyota avtalan fer úr gildi í 2012.

## Vinnan

Úrslitið strembað verður eftir eru átøk í samband við at tálma um mannaskapta partin av veðurlagsbroytingum. Tað merkir serliga átøk í mun til privata einstaklingin og til virkir. Átøkini eru serliga í samband við orkunýtslu og dálkingina, sum stendst av orkunýtsluni. Tað kann m.a. merkja, at framleiðsluhættir gerast dýrari og at virkir mugu leggja arbeiðsháttin um.

Nógvir føroyingar lurtaðu eftir Bill Clinton og boðskapur hansara er rættiliga greiður, at tann einstaki má taka ábyrgd, og tað er vinnuliga sunt at hugsa burðardygt, tað loysir seg fíggjarliga.

## Burðardyggur valdspolitikkur

Semja er ikki um hvussu stóran part av veðurlagsbroytingunum menniskja eigur, og hvussu stóran part vit veruliga kunnu ávirka, men tað er púra greitt at burðardygg framleiðsla og orkunýtsla er vorðið eitt kraftmikið amboð í marknaðarføring. Sjálvt stór luksusbilamerki, sum vit ongantíð hava knýtt at skynsamari orkunýstlu, marknaðarføra seg nú við grønum loysnum. Tað tykist heldur ikki at verða tann stóri ivin um, at tað er lættari at umleggja framleiðslu í ríkaru londunum til at verða umhvørvisskynsamari, enn tað er í fátækum londum. Hetta er ein av stóru trupulleikunum við at gera eina nýggja alheims semju. USA hevur higartil ikki vilja verið við í Kyoto. Og eitt av krøvunum Bush umsitingin hevur sett, fyri at USA skal taka undir við eini nýggjari avtalu er at Kina er við. Kina hevur seinastu árini uppliva ein ótrúligan búskaparvøkstur, men talan er eisini um ein vøkstur, sum dálkar illa. Kinverjar ansa eftir við ikki at fáa ov strong krøv, sum kunnu tálma vøksturin, USA vil ikki góðtaka krøv, um tey ikki eisini verða galdandi fyri kappingarneytar. Serliga í samband við Kina, sær USA eitt vandamál í, at landið bindur seg sjálvan til krøv, sum ger at Kina yvirhálar USA á heimspallinum. Í hesum føri handlar støðan ikki um einstaka vinnuvirkið ella útlát, men um fíggjarligu valdsstøðuna í heiminum.

## Grønan roknskap

Fyri einstaka virkið, er tað tó eingin ivi um, at tað liggur eitt virðið í at verða burðardygt. Grønir roknskapurin er vorðin ein góðskustandardur, sum selur vøruna. Tað er mikið møguligt, at tað eru átøk frá heimsins londum, sum skulu setta gongd á burðardyggar leistir, men tað er einstaklingurin og virkir, ið skulu minka um útlátinini við sínum gerðum. Í samband við vøruflutning verður nú eisini hugsað um, hvussu nógv orka og útlát, hevur verið brúkt til at fáa vøruna til brúkaran. Kanska serliga í samband vid matvøruídna, tykist tað at kunna verða eitt nýtt rák. Tað merkir m. a., at størri dentur verður lagdur á, hvar, og hvussu, matvøra verður framleidd. Tað kann fara at fáa eina ávirkan á útflaggan av framleiðslu, serliga um tað merkir, at vøra skal flytast langt aftur og fram.

## Rík & fátøk

Sonevndu G8 londini samdust á topfundinum í Heiligendamm í juni, um at verða við í tilgongdini at finna aftaluna, sum skal avloysa Kyoto avtaluna í 2012 og at hetta skuldi verða innanfyri ST karmar. Kanska av enn størri týdningi var, at sonevndu G5 londini, vakstrarmenningarlondini Kina, Brasil, India, Mexico og Suðurafrika somuleiðis stuðla hesum leisti. Veðurlagsbroytingar eru á dagskránni og veljarin í ríku londunum er eisini farin at biðja um politiskar avgerðir á hesum øki. Men um verulig gongd skal koma á arbeiði við at tálma útlátum, og burðadyggum leistum er avgerðandi neyðugt, at eisini triðjaheimslondini taka sín part av ábyrgdini. Hetta bæði tí at dálking eisini fer fram í triðjaheimslondunum men tí, at annars fara ríkaru londini at brúka tað sum skjól og umbering. Hinvegin er tað eingin ivi um, at herd krøv til menningarlond, kann verða ein forðing fyri vøkstri og menning. Skal ein politikkari velja ímillum hungur í sínum landi og framtíðar dálkingarárin á heimin, er tað ikki so torført at ímynda sær hvat vigar mest.

## Krøv

Ein nýggjur alheimsleistur fyri at menna ein meira burðardygga vinnuheim fer tí at seta krøv til, at m.a. menningarhjálp verður tengd av at menna burðardyggar vinnur, soleiðis at framburðururin í triðjaheimslondum ikki dálkar eins nógv og niðurskurðurin í fyrstaheiminum. Fokus á vakstrarhúsárin og tálman av útláti er tó í høgum kursi nú, ikki minst stuðla av, at Friðarheiðursløn Nobels fór til altjóða veðurlagsbroytingar panelið hjá ST, IPCC og Al Gore. Tað er samstundis ein staðfesting av, at dálking og orkunýtsla er ein týdningarmikil trygdarspurningur. Stríðið nú verður um at finna rætta leistin til at gera hesar broytingar og bindingar, soleiðis at tað gagnar heiminum mest møguligt. Samstundis er vandin, at eitt ov stórt fokus á veðurlagsbroytingar letur aðrar stóran alheimstrupulleikar standa í gloymskuni. Hetta er ein trupul tvístøða, tí tað er mest sannlíkt, at veðurlagsbroytingar raka tey fátækstu harðast, eins og at herd framleiðslukrøv uppá stutt skygd kunnu forða menning í fátækum økjum. Tað er lítil ivi um, at ljós er varpað á, at vit mugu ansa betur eftir Móður Jørð og tað ger, at vinnurekandi kring heimin møguliga fáa sett krøv, men tað letur eisini upp fyri nýggjum møguleikum og har fáa tey skjótastu mest burturúr. Fyri kortum hava 150 stór virkir, m.a. Nike og Lloyds, í vesturheiminum sent eina áheitan um at fáa bindandi krøv viðvíkjandi útláti, soleiðis at vinnan vendir eyguni ímótir at menna umhvørvisligar burðardyggar loysnir.